LEIGUMÁL OG KEYP

Uppgávan hjá Landsverki er:

- at góðkenna leigusáttmálar
- saman við brúkara at samráðast, sýna og ráðgeva í sambandi við leigu og keyp.

Landsverk skal góðkenna allar leigusáttmálar hjá almennum stovnum til tess at tryggja, at prísir, góðska og skyldur í sambandi við viðlíkahald og aðrar treytir fylgja vanliga støðinum í almennum leigusáttmálum.

Fyri samsýning kann Landsverk samráðast, sýna og ráðgeva í sambandi við leigu, sølu og keyp.

MANNAGONGDIR FYRI LEIGUMÁL OG KEYP:

1. Áðrenn stovnur ella stjórnarráð ger leigusáttmála við privatan útleigara, skal hann kanna hjá Landsverki, um egnaði høli longu eru til taks.
2. Einstøku stovnarnir samráðast við privatar eigarar um leigusáttmálar, har teir ráðføra seg við Landsverk. Standardleigusáttmáli skal nýtast, hesin er at finna á heimasíðuni hjá Landsverki.
3. Áðrenn einstaki sáttmálin verður lagdur fyri Landsverk, verða uppskot um leigusáttmálar send viðkomandi fólki í avvarðandi stjórnarráði.
4. Tá tilmælið til leigumál og góðkenning er uppá pláss við avvarðandi stjórnarráð verður sáttmálin latin Landsverk til góðkenning.
5. Landsverk skal fráboðast og gera tilmæli um keyp ella sølu av ognum, eisini soleiðis at heildaryvirlitið yvir landsins bygningar kann dagførast.

MEGINREGLUR FYRI GÓÐKENNING AV LEIGUMÁLUM ER:

- Leigugjøld kunnu prístalsviðgerast.
- Depositum verður ikki góðkent.
- Leiguavtalan skal helst ikki verða longri enn 5 ár, tó í mesta lagi 10 ár, um heilt serligar orsøkir eru til tess.

Umráðandi er at stovnar fáa leigumál uppá pláss í góðari tíð, fyri at gera tað møguligt at finna eina góða loysn, sum nøktar aktuella tørvin. Eisini umráðandi við góðari tíð til viðgerð av sáttmálanum soleiðis at bæði leiguprísur og sáttmálaviðurskiftini annars kunnu vera nøktandi.

Dagført tann 17. juli 2019